**SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI**
**MATR. NR. 1431 VIÐ VARÐAGØTU**

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## ØKI SAMTYKTARINNAR

**§1.** Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfestu kortskjølum I og II dagf. 26.02.2009, matr. nr. 1431 og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

**§2.** Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin við Varðagøtu 79A, B og C og 81A, B og C er 1953 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 6 grundøkir til 2x3 samanbygd hús, ið standa hvør síni megin eitt felagsøki/tún, sum bindur býlingin saman og verður savnandi fyri útstykkingina.

Stk. 4. Hvørt hús kann bert hava eina íbúð og vera bústaður fyri eitt húski.

Stk. 5. Atgongd verður til øll húsini frá felagsøkinum/túninum, har bilar kunnu ferðast undir skipaðum viðurskiftum.

Stk. 6. Sambært kap. V, §1, stk. 2a í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu verða øki roknað fyri avløgd til veg, tá ið “ *almenningurinella fleiri enn ein luteigari hava rætt til ferðslu á økinum”* og í §2, stk. 1f stendur *“ tá ið serstakar umsóknir tala fyri, kann verða loyvt at gera undantøk frá ásetingunum um vegabreidd” .*

Stk. 7. Grundøkini eru uml. 230 - 300 $m^2$ til støddar. Samlaða grundøkið er uml. 300 $m^2$ fyri hvørt hús, harav uml. 20 - 70 $m^2$ verða lagdir til felagsøki/tún.

Stk. 8. Sambært kap. IV, §5, stk. 2. í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu *“grundøkini vera 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu-ella raðhúsum. Ein partur av minstuvíddini kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil”.*

## NÝTSLA ØKISINS

**§ 3.** Økið skal nýtast til bústaðir. Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í Umhvørvisflokking fyri Vinnustykkir í Tórshavnar kommunu, samtykt av býráðnum 19. februar 2009, har tað verður mett ráðiligt av býráðnum.

Stk. 2. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki førir við sær nakra ferðslu frá starvsfólki ella viðskiftafólki til og frá økinum.

Stk. 3. Eitt eigarafelag skal skipast fyri útstykkingina, har allir eigarar skulu vera limir.

## BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SKAPILSI HÚSANNA

**§4.** Byggistigið má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 2. Nettunýtslustig má í mesta lagi verða 0,3

Stk. 3. Á hvørjum grundøki kann byggjast eitt raðhús, sum bústaður fyri eitt húski, í einari hædd og kjallara umframt eitt úthús á 10 $m^2$.

Stk. 4. Bilhús ella bilskýli kann ikki byggjast í økinum.

Stk. 5. Grundøkini skulu vera opin ímóti felagsøki og mugu ikki girðast inni

## ÚTSJÓND HÚSANNA

**§5.** Øll bygging í økinum, sum byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifultrúan og góðkennast av eigarafelagnum fyri útstykkingina. Hetta skal eisini tinglesast í skeytið fyri allar ognirnar.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## BYGGING IÐ ER

**§6.** Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

**§7.** Byggingarmynduleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.

**§8.** Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.